# Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

**Leygardagur**

Nr. 212 ● 120. árgangur
8. november 1997
Tlf. 11212 ● Fax 10941

kr. 7,00


## Jødar fáa aftur tað, teir góvu okkum

Hin føroyska Ísraelsmissiónin hevur landsstevnu í hesum døgum. Hesa ferð er aðalskrivarin fyri Norsku Ísraelsmissiónina og vitjar. Eitt av evnunum á stevnuni verður »Hvussu uppfata jødar og kristin støðuna í Ísrael í dag – politiskt og átrúnaðarliga?«

Heimatíðindi 5



## Irak brynjar seg aftur ímóti álopi

Samráðingarnar, sum ST hevur havt við Irakar eru lidnar, men eingi framstig eru gjørd. Tað siga ónevndar amerikanskar keldur, sum eisini vilja vera við, at irakar nýta trætuna sum neyðloysn fyri at flyta loynilig vápn.

Uttanlandatíðindi 8



## 1860 leiði afturat í Havn

Í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin í Havn er so trongligt, at um eitt ár er ikki pláss til fleiri leiði. Tí fer býráðið at víðka kirkjugarðin, so pláss verður fyri 475 nýggjum gravum næsta ár, sigur býararkitekturin.

Heimatíðindi 3





Litið lot av ýmsum ættum, 3-8 m/s. Skýggjað og yvirhøvur turt. Hitin 4-8°.

# Edmund Joensen: Uppskotið um Framtaksgrunnin er óforsvarligt

Ger tingið so við Framtaksgrunnin, sum fíggjarnevndin hevur skotið upp, vil løgmaður ikki taka ábyrgdina av tí. Hann kallaði í gjár uppskotið hjá fíggjarnevndini óforsvarligt, og vildi hava nevndina at taka tað aftur og viðgera tað meira.

KATRIN PETERSEN

Løgmaður er ikki nøgdur við broytingarnar, sum fíggjarnevndin hevur gjørt við uppskot hansara um at lata Framtaksgrunnin fáa nýggjan eginpening. Í tinginum í gjár segði hann, at hetta var eitt sera álvarsamt mál, sum kravdi, at tinglimir hugsaðu seg væl um.

– Eg ávari løgtingið, og biði tað um at taka hetta í størsta álvara. Tekur tingið ikki eina forsvarliga avgerð, taki eg ikki ábyrgdina av henni, segði løgmaður.

Hann visti tó aftur, at tað var nýval, hann meinti við, tá Finnbogi Ísakson spurdi hann bein leiðis um hetta.

Edmund Joensen helt ikki, at broytingaruppskotið hjá fíggjarnevndini kann brúkast sum tað er. Ein orsøk var, at nýggjar upplýsingar vóru komnar fram. Føroya Banki hevur sent Fiskasøluni eitt bræv, har bankastjórin sigur avgerðina hjá tinginum kunnað fáa fylgjur fyri, hvussu nógvar pengar bankin vil læna Fiskasøluni. Hetta bræv høvdu flestu tinglimir hoyrt um, og vildu fegin siggja tað – ella hoyra, hvat stóð í tí. Millum onnur var Lassi Klein á røðarapallinum og bað løgmann lesa hetta brævið upp. Men hetta vildi løgmaður ikki.

– Hetta er eitt internt skriv, sum ikki hóskar seg til at lesa upp av tingsins røðarapalli, segði Edmund Joensen.

Hann fýltist á, at brævið yvirhøvur var komið fram alment – tað átti at farið til fíggjarnevndina, og verið viðgjørt har, helt hann.

At tinglimir vóru ørkymlaðir í gjár, var onki at ivast í. Summir spurdu, hví málið skuldi aftur í nevnd, aðrir hildu, at einasta loysn var at fáa nevndina í Framtaksgrunninum frá.

Formaðurin í fíggjarnevndini, Sune Jacobsen, var áðrenn døgurða á røðarapallinum og segði, at hann kundi ikki í løtuni taka støðu til, um hann fór at biðja um at fáa Framtaksgrunnin aftur í nevndina til viðgerðar.

Politikkur, síða 4



## Meira um Janus skald

1994 kom út fyrsta bind av bókmentaligu ævisøguni um stórvirkna skald okkara J.H.O. Djurhuus – Janus.

– Árið eftir kom út annað bind. Og nú um ein mánað kemur út triðja og síðsta bind. Hanus Andreassen skrivar. Mentunargrunnur Studentafelagsins gevur út. Hanus sigur, at hann hevur úr at gera at greiða hesa síðstu bókina úr hondum. Hon er drúgvari enn hinar báðar fyrru og er arbeiðskrevjandi.

*Víðskorin*

# Hann lærir børnini at fletta

Frítíðarskúlin er farin undir eitt nýtt og spennandi tiltak, ið nevnist heystverkstaður. Børnini læra at fletta og at matgera úr avroðunum. Eisini læra tey at evna til úr hornum, beinum, skinnum og ullini.

DIA MIDJORD

Feðgarnir Jørleif og Hanus Kurberg vístu børnunum í Frítíðarskúlanum í gjár, hvussu eitt lamb verður flett. Hetta fór fram á Brandstøðini við Oyggjarvegin, har børnini eisini sleppa at siggja sløkkiliðsbilar, sløkkiútgerð og annað, sum hoyrir til eina slíka støð.

Tiltakið verður nevnt heystverkstaður og evnið er seyður og slakt. Børnini læra, hvussu flett verður, og hvussu ein kann matgera eitt nú rullupylsu og blóðpylsu úr avroðunum. Eisini læra tey at garva og rota skinn og evna til úr hornum og beinum.

Jørleif og Hanus fletta aftur mánadagin, týsdagin og mikudagin. Tey børnini, sum vóru við til flettingina í gjár, skulu so mánadagin í holtur við at matgera úr avroðunum. Tá sleppa onnur børn at siggja, hvussu ein seyður verður flettur.



Mynd: Kalmar



Nýggi stjórin á Oljufyrisitingini, Herálvur Joensen, sum er ættaður av Skála, hevur verið í starvinum í ein góðan mánað. Í gjár var móttøka á Debesartrøð Mynd: Álvur

# Ungur stjóri á Oljufyrisitingini

Í gjár var skipað fyri móttøku á Oljufyrisitingi í samband við, at løgfrøðingurin, Herálvur Joensen tók við starvinum, sum deildarstjóri í Vinnumálastýrinum eftir Martin Heinesen, sum hevur røkt starvið higartil, og nú er farin aftur í gamla starvið sum stjóri á Jarðfrøðissavninum.

ELI GUTTESEN

Ikki kann sigast annað enn, at væl hevur roynst hjá unga skálamanninum, sum nú hevur sett sett seg í stjórasessin á Oljufyrisitingini.

Herálvur Joensen er 35 ár og var longu útbúgvin sum løgfrøðingur í Keypmannahavn í 1991. Frá á várið í 1991 til um heystið 1992 starvaðist hann sum løgfrøðingur hjá Advokatskrivstovuni í Fr. Petersensgøtu. Síðan fór hann til Onglands, har hann tók masterprógv í altjóða rætti í 1993 frá universitetinum í Bristol í Onglandi. Haðani fór hann aftur til Keypmannahavnar har hann starvaðist sum løgfrøðingur hjá Statens Luftfartsvæsen, til hann fekk starv sum løgføðingur á Oljufyrisitingini 1. november í 1994.

Høvuðsuppgávan hjá Herálvi Joensen á oljufyrisitingin hevur verið at virka sum skrivari hjá oljuráðleggingarnevndini, sum hevur arbeitt við nýggju oljulóggávuni, ið kemur til viðgerðar í tinginum fyrsta dagin. Harumframt hevur Herálvur havt umsitingina av øllum forkanningunum, sum gjørdar eru í føroyskum øki higartil. Hetta hevur verið kravmikið arbeiði og tað er í hesum arbeiði at ungi skálamaðurin hevur víst sítt hegni.

Síðan 1. apríl í ár, hevur Oljufyrisitingin verið ein deild av Vinnumálastýrinum og tað er hesa deildini Herálvur Joensen skal leiða. Tá bygnaðarbroytingarnar verða gjøgnumførdar, flytur Oljufyrisitingin væntandi saman við Vinnumálastýrinum.





Lesið tíðindi á Interneti

– dag sum nátt –

HVØNN DAG



**Ríkisfelagsskapurin**

Fundur verður mánakvøldið 10. november kl. 19.30 á Klaksvíkar Sjómansheimi. Jóhannes Martin Olsen fólkatingsmaður, hugleiðir um »Ríkisfelagsskapur og framtíðin«, og Gunnar K. Nattestad frá Ungmannafelagnum tosar um »Ung og ríkisfelagsskap«. Aftaná verður orðaskifti.

Øll sambandshugað eru vælkomin!

**Norðoya Sambandsfelag**